

Mynd: Jens Kristian Vang

## Jógvan Arge

**Vit kenna hann frá mongum pallum. Á politiska økinum hevur hann fyri Tjóðveldisflokkin verið býráðslimur, løgtingsmaður og gjørdist 1. januar 2005 varaborgarstjóri í Tórshavnar Kommunu. Í bókmentaheiminum hevur hann roynt seg sum rithøvundur og eftirhondini givið 17 søguligar bøkur út um teir menn, sum undan okkum tóku hetta land. Hann hevur starvast sum tíðindamaður í Útvarpi Føroya í 35 ár og verið tíðindaleiðari, programleiðari og sagt frá óendaliga mongum ítróttarligum stórhendingum, har hann best er kendur frá kappróðri og fóbólti.**

**Næstu ferð:**
**Rúna og Mathea Hilduberg**

# ru brøðurnir bleytir

ni, áræði og sjálvsálit. Onnur við vald og
Magni Arge eru samdir um, at handan
eir eisini bleytir

Hann risti heldur ikki í brókunum, tá Sinn Fein-stuðlar loðsaðu hann gjørgnum duldar gøtur í Belfast til sjálva Bernadette Devlin. Stutt eftir lupu protestantar á húsini hjá Sinn Feinn og drupu ein av Sinn Feinn-stuðlunum í sama húsi, har tey hittust.

*Hvat hevur ávirkað tykkum mest?*

**Jógvan:** Tað er ongin ivi um, at tað eru tey umhvørvi, sum vit hava livað í. Mest eru vit ávirkaðir av foreldrunum Niels Juel og Petru, men serliga vit eldru systkinini fingu eisini mangt og hvat við okkum niðri í Tróndargøtu hjá abbanum Bil-Óla og ommuni Mallu. Vit komu eisini norður til Gøtu at ferðast hjá ommuni og abbanum har, Suffíu og Jóan Eliasi Gregersen. Tað vóru altíð fagnaðarferðir, og har vóru eisini nógvar gummur, gubbar, skyldfólk og vinfólk av ymsum slag.

**Magni:** Mesta ávirkanin er heimanífrá. Abbarnar minnist eg ikki nógv til, tí teir doyðu, meðan eg var lítil, men ommurnar kendi eg. Í okkara húsi var pápi tann almenni persónurin, men mamma smæðist ikki burtur. Hon hevur sínar sterku og avgjørdu meiningar og er av mest sannførdu loysingarfólkum. Tað sigur kanska okkurt um okkum báðar, at vit eru úrslit av eini samanrenning millum genini frá Gregersen og Arge.

### Handan brynjuna

*Vit kenna tykkum sum tveir brøður við sjálvsáliti og áræði, sum ikki fýra fyri at nýta albogarnar og gera um tykkum. Hvaðani kemur henda náttúran?*

**Jógvan:** Hatta við hasum albogunum man vera ein mýta, sum onkur kappingarneyti hevur funnið uppá. Tað kann vera, at vit gera um okkum viðhvørt, men hvat so? Tað eru tað so nógv onnur, sum eisini gera. Men tað merkir ikki, at vit nýta hvørt høvi til at leypa framav og troðka onnur til viks. Minni enn so.

**Magni:** Eg hugsi, at evnini at formulera seg føra teg skjótari fram í oddin at tala eina sak. Og dámar tær at taka við slíkum avbjóðingum, so gongur tað bara slag í slag frameftir. Hvussu fólk meta um hetta, kann vera so ymiskt. Onkur fegnast um, at nøkur eru, sum hava dirvið at taka við ábyrgd, onnur halda seg vera troðkað til viks. Onkur heldur, at vit altíð tráa eftir at vera í fokus. Tað slapst ikki undan at vera frammi av og á í einum lítlum útvarpi, men so løgið tað ljóðar, so hugsi eg ofta um, hvussu eg best kann sigla millum skerini og skáka mær undan tí stóra polemikkinum.

**Jógvan:** Vit skuldu longu sum blaðungir hoyra fyri øll tey mistøk, útvarpið gjørdi, og fyri tað, sum ikki riggaði har. Einaferð løgdu nonnurnar á meg í skúlanum fyri okkurt, sum útvarpið skuldi hava sagt. Tað kundi vera eitt sindur beiskt at standa skúlarætt í mannamúgvu fyri slíkt, sum tú ikki átti lut í, men tú herdist óivað av tí.

**Magni:** Longu sum 10 ára gamal sat eg og vardi avgerðir hjá pápa móti atfinnandi lærarum. Eg skuldi hoyra nógv um mína familju, og tað hevur ivaleyst gjørt, at samanhaldið innanhýsis er sterkt, og at vit úteftir hava brynjað okkum at taka ímóti ágangi og atfinningum. Hin almenni profilurin er merktur av hesi brynjuni.

*Finnast so eisini bleytar síður handan brynjuna?*

**Jógvan:** Sjálvandi. Øll menniskju hava sínar bleytu síður og eginleikar, og tú skalt minnast til, at tær løturnar, tú ert í almennum víggi, eru ein so lítil og avmarkaður partur av einum heilum menniskja og allari tíðini, tú livir. Tí ber ikki til at gera niðurstøður um menniskju bert út frá tí almenna partinum. Heildarmyndin kann saktans vera meiri nuanserað.

**Magni:** Tað er møguliga torført at sleppa inn um brynjuna, men handan hana býr sjálvsagt ein bleytari og eymari partur, sum er meiri sjónligur í privata lívinum, og sum tey nærmastu uppliva. Men eg meti eisini, at hesin parturin gerst sjónligari við árunum yvirhøvur.

### Lívið, sum munar

*Vildu tit onkuntíð ynskt tykkum eina meiri friðarliga og anonyma lívsleið?*

**Jógvan:** Nei, tað havi eg ikki hugsað so nógv um, tí at vera í almennum ljósi er ein partur av tí, eg havi hug at gera. Eg upplivi tað ikki sum eina byrðu, hóast tað av og á hevur leikað hart á.

**Magni:** Eg havi trivist væl í frontlinjuni og havi helst brúk fyri stórum avbjóðingum fyri at koma upp í gear, men eg havi dugað illa at halda frí og kobla frá. Onkuntíð vildi eg ynskt meiri frið kring meg sjálvan og mítt arbeiði.

*Men er tað ikki prísurin, um ein vil avrika nakað her í lívinum?*

**Jógvan:** Tað kemur ið hvussu so er lítið burtur úr at renna undan og goyma seg burtur.

**Magni:** Skalt tú avrika nakað út yvir tað vanliga, noyðist tú at leggja lív og sál í arbeiðið. Tilveruna frá 8-16 við fimm viku frítíð kanst tú gloyma alt um.

Út eftir kann tilveran í almenna ljósinum tykjast glamourøs, men úrslitini koma ikki av sær sjálvum - tað skal arbeiðast fyri sakini.

Hetta eru royndirnar, sum eitt nú pápi okkara gjørdi sær í útvarpinum, og tað er hesin andin, vit bera víðari. Eitt virkið lív, sum munar.

### Fakta um Jógvan Arge

Formaður í Næmingafelagnum í Hoydølum 1965
Studentsprógv 1966
Prógv sum journalistur 1970
Programmedarbeiðari í Útvarpi Føroya í 1970
Tíðindaleiðari í ÚF 1979-1989
Programleiðari í ÚF frá 1989
Formaður í Ítróttasambandi Føroya 1978-1980
Býráðslimur í Havn frá 2001
Løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin 2001-2002
Varaborgarstjóri í Havn frá 2005